HEILSUMÁLARÁÐIÐ

Suðuroyar sjúkrahús
800 Tvøroyri
*Stíla: sjúkrahúsleiðsluni*

20 november 2013
Mál: 13/00197-19
Tygara skriv:
Viðgjørt: JS

**Viðv. støðutakan til tilmæli hjá Landslæknanum um at skipa eina føðideild fyri Føroyar**

Í vár fekk landsstýrismaðurin eitt fakligt tilmæli frá Landslæknanum um, at tað einans verður skipað ein føðideild í Føroyum, sum fevnir um alt landið. Við grundarlag í tilmælinum gjørdi landsstýrismaðurin av, at tað skuldi farast undir at útgreina, hvussu ljósmøðraskipanirnar virka á ávikavist Landssjúkrahúsinum (LS) og á Suðuroyar sjúkrahúsi (SS). Í hesum sambandi skuldi eisini greinast, hvat tað kom at merkja, um føðideildin á SS verður niðurløgd og tær umleið 30 føðingarnar um árið verða fluttar til LS. Arbeiðssetningur varð sendur út til sjúkrahússtjórarnar í juni í ár.

Í september kom svar frá sjúkrahúsunum. Talan var um eitt skriv, men ikki eitt felags svar. Við skrivinum vórðu hjálagdar viðmerkingar frá ávikavist medisinska yvirlæknanum, kirurgiska yvirlæknanum og ljósmøðrunum á Suðuroyar sjúkrahúsi. Eisini er skriv komið frá Sjúklingaráðnum í oktober í ár um sama mál.

Málið er viðgjørt við atliti at fakligum, sosialum og fíggjarligum atlitum.

Fakliga er er neyvan nakar ivi um at tað er tryggast, at allar føðingar fara fram á LS, tí ongin obstetikari/føðilækni, barnalækni ella narkosulækni eru regluliga á SS.

Sosialt er harafturímóti neyvan ráðiligt at flyta føðingarnar undir verandi umstøðum. Bústaðarmøguleikarnir á Herberginum eru als ikki nøktandi til at 30 barnakonur, og í fleiri førum við maka/avvarðandi, koma til Havnar 2-4 vikur áðrenn føðing.

Fíggjarliga er málið í tí tilfarinum sum sjúkrahúsini hava sent Heilsumálaráðnum, alt ov illa lýst til at gera nakra niðurstøðu um, hvat tað kemur at kosta, um tað bert verður skipað ein føðideild í Føroyum. Um vaktarskipanin hjá ljósmøðrunum í Suðuroy verður varðveitt, verður talan helst um eina dýrari skipan enn í dag.

Landsstýrismaðurin hevur tí tikið hesa avgerð í málinum um Føðideildina á Suðuroyar sjúkrahúsið.

- Føðideildin á Suðuroyar sjúkrahúsi verður ikki niðurløgd.

- At ein skipan verður sett í verk skjótast til ber, ið tryggjar at allar barnakonur við fyrstu læknakanning fáa holla kunning um burðarmøguleikar og burðarstøð, t.e. Føðideildirnar á Landssjúkrahúsinum og Suðuroyar sjúkrahúsi umframt viðurskifti við at eiga heima. Á henda hátt kunnu barnakonur gera eitt kunnað (informera) val av føðistað. Hetta er samstundis í tráð við tilmælið sum føðiskipanarnevnd hevur latið landsstýrismanninum.

Eirargarður 2 • FO-100 Tórshavn
Tel: +298 304050 • Fax: +298 304025 • E-mail: hmr@hmr.fo

Heilsumálaráðið kemur í fyrstu syftu, at taka hetta málið upp við Suðuroyar sjúkrahús, Landssjúkrahúsið og Landslæknan.

- At tað verður betra munandi um umstøðurnar á Herberginum millum annað fyri tær kvinnur, sum hava tørv á bústaði í sambandi við føðingar á Landssjúkrahúsinum.

Vinaliga

Karsten Hansen
landsstýrismaður